Sosialu málini

eftir J. Lindenskov

(Framhald)

Sjúkrakassalógin

Frá 1. januar í ár kom nýggja sjúkrakassalóggávan í gildi. Eftir hesi nýggju lóg verða fleiri veitingar aftrat teimum, ið sjúkrakassarnir góvu frammanundan. Tær mest týðandi broytingarnar eru:

1. Øll skulu vera sjúkratryggjað.
2. Sjúkrakassarnir leggja í størri eindir.
3. Aldursmarkið fyri innliman flutt frá 15 til 16 ár — um eitt ár eftir lógin kom í gildi verða øll tey, sum ikki hava skrivað seg sum limir, automatiskt sett sum limir.
4. Jaðarmøðrahjálpin verður goldin av sjúkrakassanum og 1% gjaldið fellur burtur.
5. Flutningur er nú vanlig sjúkraveiting.

Í nýggju lógini hevur serliga verið hugsað um tey kor, sum smáplássini eru fyri, har tvørligt er at fáa læknahjálp. Her verður hugsað um flutningsskipanina og avgreiðsluna av medisini, sum statsstudningur eisini verður latin til, og sum annars ikki er galdandi í donsku sjúkrakassalóggávuni.

Tá sjúkrakassarnir í sínari tíð bóðu um at jarðarferðhjálpin eisini varð ein vanlig veiting, fekk hetta mál stóra mótstøðu á tigni. Í dag man neyvan vera nakar, sum vil hava hesa hjálp burturtiknað.

Útbyggingin av samferðsluni hevur gjørt tað lættari at koma til flest allar bygdir. Orsøkin til at smáplássini ikki hava havt so stórar útreiðslur til sjúkrahjálp man einamest vera tað sparsemi, sum hevur merkt hesi fólk og eisini tað, at tey í mongum førum hava viljað spart læknanum frá torførum ferðum um fjøll ella eftir sjógvi. Á hesum øki er nógv broytt, hugsa vit t. d. um Norðoyar, so er sjón fyri søgn, at læknavitjanin er vaksin nógv í norðurbygdunum síðani tunnellin varð gjørd. Nýggja lóggávan kemur hesum bøttu viðurskiftum tilgóðar — flutningur til lækna skal gjaldast av sjúkrakassanum og í einstøkum føri fyri tann, sum fer við sjúklingi.

Samanrenning millum sjúkrakassarnar kemur at hava stórar fyrimunir — eisini tann í lógini nevnda frívilluga hjálpin, sum ikki hevur verið rættiliga góð í smáum sjúkrakassum, kann tá koma á hædd við tær veitingar, sum fólk á stórplássum longu nú fáa.

Spesialskúlin

Løgtingið samtykti í vár at luttaka í byggingini av spesialskúla í Føroyum. Síðani 1962 er farin fram undirvísing fyri brekað (handikappað), bæði børn og tilkomin. Hesin skúli hevur sum kunnugt trongar umstøður og varð tí farið undir at gera kanningar við tí endamáli at finna fram til eina høskandi framtíðarskipan fyri henda part av skúlaskapi okkara.

Úrslitið varð, at løgtingið samtykti at luttaka í bygging og rakstri av skúla fyri brekað. Nú fara ymiskar fyrireikingar fram og ætlandi verður farið undir bygging av hesum skúla so skjótt sum projekteringsætlanir eru fingnar til vega.

Men áðrenn endaliga byggingin fer fram, verður málið lagt fyri tingið til góðkenningar.

Landsstýrið er av teirri áskoðan, at teir stovnar, sum taka sær av teimum ófullføru, og teimum sum treingja til serliga undirvísing og hjálp, eiga at vera í Føroyum, serliga við tí í huga, at einstaklingurin hevur størri møguleikar at fáa mest burturúr tilveruni heima, enn at verða beindur av landinum, burtur frá sínum.

Væl er tað so, at hetta ikki verður gjørt eftir einum degi, men landsstýrið vil virka fram ímóti hesum, og er hetta tiltakið eitt stig fram á hesi leið.

Ansingarheim - sjúkrahúsviðarskifti

Landsstýrið hevur sett serkøna nevnd at kanna tørvin fyri ansingar- og uppihaldsdeildum ella -heimum. Tað er støðugt stórt trýst á sjúkrahúsini til innleggingar av sjúklingum, sum treingja til røkt. Í byggjan er ansingar- og ellisheim í Vágum, sum væntandi verður liðugt um 2 ár.

Sjúkrahúsini eru enn ikki liðugt útbygd. Á landssjúkrahúsinum fer støðugt fram umbyggjan av tí gamla »Dronning Alexandrines Hospital«, og sum m. a. skal rúma føðideild og gynækologiska deild. Landsstýrið hevur roynt at virka fyri at bøta um læknatrotið. Tann fyribils skipan er roynd at fáa læknar, sum fyri styttri tíð kunnu røkja størv, men hetta er ein dýrur vegur, men er tó nýttur, tá tað hevur verið ógjørligt at fáa læknar til tey ósettu kommunulæknastørvini. Tey kommunulæknadømi, sum støðugt liggja í læknaloysi og tí bert hava havt læknar fyri styttri tíð eru: Sandoy, Suðuroyar syðra sýsla (Vágur), Vágarnar, Saltangará. Tað eru fleiri føroyingar, sum lesa læknafrøði og sum starvast uttanlands. Hóast roynt er eftir at fáa lækna, bæði við lýsingum í tíðarritum í ymsum londum og við persónligum áheitanum, hevur tað ikki eydnast. Á sjúkrahúsunum hevur heldur ikki eydnast at fáa læknar til øll størvini. Tó er nú lækni settur í starvið sum eygnalækni, og kemur hann 1. oktober 1970.

Tað hevur verið nortið við tann møguleikan at samskipa kommunulæknadømini og at bygd verða sonevnd »læknasentur«, soleiðis at sjúklingurin kemur til sentrið, ístaðin fyri at læknin í øllum førum skal fara til sjúklingni. Hetta krevur at bygd verða læknahús við viðgerðarrúmum, patientrúmum og at sjúkrasystur er knýtt at slíkum sentri. Á henda hátt hevði læknaviðgerðin óivað verið betri, læknni betri førur fyri at røkja prakis og ein samskipan av læknadømum kundi farið fram, ið eisini hevði havt tann fyrimun, at t. d. fleiri læknar vóru í sama sentri og kundu so arbeitt saman, skift vaktir o. t.

Ynski er eisini frammi frá sjúkrakassasíðu, eitt nú úr Vágum, at ein tílík skipan fekst í lag, og er tað líkt til, at ein tílík skipan skundaði undir, at læknar komu henda vegin og bøtti um arbeiðsumstøðurnar hjá læknanum. Tað er einki at taka seg aftur í, at einsamallur læknir í einum læknadømi hevur úr at gera og skjótt kann verða overvaður. Ein slík skipan hevði eisini verið hentari fyri tey læknasøkjandi.

Barnaheim

Á Føroya Barnaheimi er tørvur á umbygging. Á komandi figgjarlógaruppskoti verða settar av kr. 90.000 til hesa bygging.

Annars tykir tørvurin ikki at vera vaksin at fáa verjuráðsbørn á barnaheim, talið á hesum var 47 og er tað sama í ár. Harafturímóti er tørvur á heimi — upptøkuheimi — fyri børn, sum bert fyri styttri tíð skulu vera á heiminum eins og deild fyri ung, sum eru farin uppum barnaheimsaldur. Á tí lendi, sum Barnaheimið hevur, er rúm fyri øllum tílíkum stovnum.

Vistarheim

Á øðrum øki er at nevna Vistarheimið í Havn, sum í løtuni heldur til í ognini Fr. Petersensgøtu/J. Paturssonargøtu. Á hesum heimi er rúm fyri uppi 10 fólkum.

Vistarheimið tekur sær av ófullførum, sum tørva at vera á slíkum heimi, har tey eisini verða sett til ymiskt høskandi virksemi. Stovnurin kemur í framtíðini at krevja størri pláss, men við teimum hølum, sum tey núverandi, eru umstøðurnar betri, enn tær higartil hava verið.

Alv

Revalideringsstovnurin ALV hevur nú í mong ár rikið eitt sera týdningarmikið virksemi í samfelagnum. Nú verða umstøðurnar uppaftur rúmari figgjarliga og líkindini fyri einari støðugari útbyggjan eftir høskandi viðurskiftum, skuldu verið góðar. Hesin stovnurin er eitt av amboðunum, sum samfelagið eigur til at stuðla fólki, sum av ymsum orsøkum eru tikin burturúr teirra dagligu vinnu til aftur at gerast før at finna sær høskandi arbeiði.

Arbeiðsloysis-, sjúkra- og dagpeningar

Nevndin til kannan av hesum omanfyri nevndu viðurskiftum er ikki liðug, so at álit kann leggjast fram. Tað er torført at siga, hvussu stórur tørvurin er, men eftir leysligum metingum kemur ein dagpeningaskipan (arbeiðsloysi og sjúku) at kosta um 3,8 mill. krónur, leysliga mett 2 milj. fyri sjúkradagpening og um 0,8 milj. vanlukkupeningur og um 1,0 milj. kr. arbeiðsloysispeningur, men kemur harafturímóti at minka um útreiðslurnar til forsorgarhjálp og útreiðslurnar hjá Vanlukkutryggingini, men hvussu nógv er ilt at siga.

Eykapensjón

Spurningurin um eykapensjón varð reistur eftir at danir høvdu fingið eina ATF-skipan, sum varð sett í verk í Danmark í 1964, men tá eykapensjónin ikki verður prístalsviðgjørd, hevur henda veiting ikki tann týdning fyri vanligt fólk, sum hon hevði í byrjaniní.

Síðani er skipaður »sosiali grunnurin«, sum fær 1 pst. av inntøkunum frá 1971 at rokna og frá 1974 2 pst., sum skal gjaldast av skattaborgarunum umframt tað vanliga fólkapensjónsgjaldið. Ætlanin er so at grunnurin skal brúkast til eina pensjónsskipan, ið verður løgskipað seinri, so at skipanin kann setast í verk í 1976. Peningurin verður nýttur til at keypa virðisbrøv, sum so verður endamál grunnsins fyribils. Ein skipan lík teirri donsku ATP skipanini kemur skjótt at missa sítt virði.

Um tað ístaðin varð skipaður ein eykapensjónsgrunnur, hevði ein slíkur verið hentur til ymsa figgjan, ídnað, húsabygging o. s. fr.

(Framhald)

Føroya Handilsskúli

Skúlaárið byrjar aftur 1. september. Nýggir næmingar eiga at *skriva* eftir innmeldingarseðli innan 10. august.

Í Fuglafirði og á Tvøroyri eru hesir møguleikar:

I. Fyrireikingarprógv í føroyskum og donskum og rokning
II. Statsgóðkent prógv í maskinskriving, bókhald, enskum og rokning

Í Sørvági:

Fyrireikingarprógv í føroyskum, donskum, rokning og enskum.

Í Klaksvík:

I. Handils medhjálpara prógv (kontórlinjan)
II. Fyrireikingar prógv til handilsskúlan
III. Statsgóðkent prógv í maskinskriving og enskum

Í Tórshavn:

I. Handils medhjálpara prógv (kontór- og handilslinjan)
II. Fyrireikingar prógv til handilsskúlan
III. Statsgóðkent prógv í maskinskriving, bókhald, enskum, týskum og *matematik*
IV. Statsgóðkent prógv í roknskaparlæru I og II.

Tey, ið søkja inn á skúlan skriva til:

Fuglafjørð: Arnold Abrahamsen, lærari
Tvøroyri: Hjørleif Enn, lærari
Sørvágur: Tóri Skaalum, lærari
Klaksvík: Páll á Dul, lærari
Tórshavn: Peter Højgaard Simonsen, lærari

Føroya Handilsskúli



Spinnið í Gøtu

tygum fáa gott tógv, og skjóta avgreiðslu.

Vit keypa óvaskaða og vaskaða ull og selja øll sløg av føroyskum tógvi.

TØTINGARVIRKIÐ

v/ Ólavur Gregersen — tlf. 20 í Gøtu

FÆRØSK MARGARINE

Vita No 1

VITAMINISERET

FÆRØSKT PRODUKT FINT PRODUKT